# Mótstøðufólk forða útbygging av Heathrow

Tey, sum eru ímóti ætlanini at byggja Heathrow-floghavnina í London út, halda seg nú hava funnið eitt munagott stig til at forða fyri, at ætlanin verður framd í verki. Tey hava keypt eitt jarðarstykki í økinum, sum skuldi brúkast til floghavn. BBC sigur, at jarðarstykkiið er til støddar sum ein hálvur fótbóltsvøllur. Sum er eru 480.000 komur og fráferðir í Heathrow, men aftan á útbyggingina verður talið 720.000. Tey, sum eru ímóti útbyggingini, siga, at floghavnin fer at dálka ov illa.



# Íslendingar mist álitið

Íslendingar hava ikki gott álit á sínum bankum og politikarum sum fólk í flestu øðrum londum. Ein kanning, sum bretska blaðið The Guardian hevur latið gera, vísir, at 46 prosent av teimum spurdu íslendingunum hava álit á bankakerinum, og at 44 prosent hava álit á, at politikararnir hava skil á búskaparviðurskiftunum. Sambært The Guardian høvdu í meðal 52 prosent av teimum spurdu í kanningini álit á sínum politikarum. Størsta álitið á politikararnar er í USA, har heili 63 prosent siga seg hava álit á, at politikararnir halda skil á búskapinum.

# Sparingar í Mentamálaráðnum skapa ótta

**Á fíggjarlógini fyri 2009 er Mentamálaráðið skert millum 700 og 800.000 krónur, og tí hevur Helena Dam á Neystabø skotið upp, at øll starvsfólkini skulu halda frí eina viku uttan løn. Men hetta hóvar ikki fakfeløgunum**

SPARITILTØK

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tey fýra fakfeløgini, sum vara av starvsfólkunum í Mentamálaráðnum, Búskapar- og Løgfrøðingafelagið, Starvsmannafelagið, Akademikarafelagið og Lærarafelagið, fara í morgin á fund, har tey skulu viðgera íkomnu støðuna, har teirra limir eru bidnir um at taka støðu til eitt uppskot um sparitiltak frá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í Mentamálum.

Á fíggjarlógini fyri 2009 er Mentamálaráðið skert millum 700 og 800.000 krónur, og hevur landsstýriskvinnan tí lagt hetta uppskotið fyri starvsfólkini.

Uppskotið snýr seg um, at øll starvsfólkini í Mentamálaráðnum verða biðin um at halda frí í eina viku uttan løn. Hetta skal eftir ætlanini spara Mentamálaráðnum millum 200 og 300.000 krónur.

Jóanna Djurhuus, forkvinna í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum, segði í gjár við Kringvarp Føroya, at Búskapar- og løgfrøðingafelagið prinsipielt er ímóti spárileistinum hjá Mentamálaráðnum, og at felagið viðgjørdi støðuna, og fór at boða sínum limum frá í gjár.

- Vit høvdu ein limafund í gjár, har vit viðgjørdu støðuna, og vit hava gjørt eina niðurstøðu. Men enn vilja vit ikki avdúka hana, tí í morgin fara vit á fund við hini fakfeløgini, sum hava starvsfólk í Mentamálaráðnum, og so koma vit við eini felags fráboðan í morgin, sigur Jóanna Djurhuus, forkvinna í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum.

## Skapar ótta

Uppskotið hjá Helenu Dam á Neystabø hevur eftir øllum at dóma skapt ótta millum fakfeløg, ið varða av almennum starvsfólkum.

Í gjár boðaði Starvsmannafelagið frá, at tey kunnu ikki taka undir við sparitiltakinum, ið landsstýriskvinnan hevur skotið upp.

- Vit eru ikki greið yvir, hvat uppskotið hjá Mentamálaráðnum ítøkiliga inniber, og tað fara vit fyrst at kanna nærri. Men vit kunnu ikki góðtaka eina lønarniðurgongd, segði Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum við Kringvarpið í gjár.

Jóanna Djurhuus, forkvinna í Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum heldur eisini lítið um tiltakið.

- Tað hevur verið ført fram, at hetta møguliga verður ein góðtikin sparileistur aðrastaðni eisini, og sum fakfelag eru vit prinsipielt ímóti eini slíkari loysn, sigur Jóanna Djurhuus.




*Fakfeløgini hjá starvsfólkunum í Mentamálaráðnum koma í morgin við eini felags útmelding um sparitiltakið, ið aðalráðið hevur skotið upp. Starvsfólkini skulu eftir ætlan sendast heim í eina viku uttan løn*

# Hetta eru ikki sparingar

**Sambært formanninum í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum, Anfinn Kallsberg, er talan als ikki um nakrar sparingar í Mentamálaráðnum**

SPARITILTØK

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Formaðurin í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum, Anfinn Kallsberg, heldur als ikki at talan er um nakrar sparingar í Mentamálaráðnum.

- Tann veruligi trupulleikin er, at tað eru for lítið av pengum í skipanini. Seinastu árini hava tað verið galloperandi útreiðslur, og um man ikki roynir at bremsa gongdini, so veksur hallið á fíggjarlógini, sum nú er omanfyri 500 milliónir krónur, sigur Anfinn Kallsberg, løgtingslimur fyri Fólkaflokkin og formaður í fíggjarnevndini.

Sambært honum er talan heldur um at Mentamálaráðið má halda seg innanfyri játtanina, ið er samtykt.

- Vit hava samtykt eina játtan til Mentamálaráðið, har trý prosent í lønarvøkstri eru íroknað. So tað einasta vit í veruleikanum hava sagt er, at tað verða ikki fleiri almenn størv sett í 2009. Trupulleikin í Mentamálaráðnum er, at eitt starv er sett afturat, og tí mugu tey taka til slík tiltøk, vísir Anfinn Kallsberg á.



# Mátin ljóðar tiltalandi

**Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, heldur at sparitiltakið hjá aðalráðnum í Mentamálaráðnum ljóðar tiltalandi.**
**– Tað at starvsfólkini taka felags ábyrgd, heldur enn at tvey ella trý fólk verða koyrd til hús, ljóðar tiltalandi, sigur fíggjarmálaráðharrin**

SPARITILTØK

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað at almenn arbeiðspláss hugsa øðrvísi og solidariskt, tá tey skulu spara, ljóðar eftir øllum at døma tiltalandi til fíggjarmálaráðharran, Jóannes Eidesgaard.

Nú Mentamálaráðið hevur skotið upp fyri sínum starvsfólkum, at tey skulu halda frí í eina viku uttan løn, heldur enn at eini tvey ella trý fólk verða uppsøgd, er hugsandi, at fær tað undirtøku, verða líknandi tiltøk sett í verk aðrastaðni.

- At starvsfólkini vísa solidaritet fyri hvørjum øðrum, heldur enn at fólk verða søgd úr starvi, ljóðar tiltalandi uppá meg persónliga, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.

Tó skilur hann væl at fakfeløgini óttast sparitiltøkini.

- Talan er jú um eina reella minking í árslønini hjá starvsfólkunum, og tað sigur seg sjálvt at fakfeløgini mugu umhugsa hetta uppskotið, sigur Jóannes Eidesgaard

Er talan ikki um eitt tiltak, ið kann skapa precedens fyri líknandi tiltøkum í framtíðini?

- Tað kann væl vera at hetta kann skapa precedens fyri líknandi tiltøkum í framtíðini. Men tað verður jú upp til hvørt ráðið sær at gera av. Sum umboðandi lønardeildina vil eg ikki gera fleiri viðmerkingar enn tær, at so leingi Mentamálaráðið fær tær tænastu gjørdar, sum tey skulu hava, og fyri teir pengarnar, ið eru játtaðir, er eingin trupulleiki, greiðir Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum frá.



*- At starvsfólkini vísa solidaritet fyri hvørjum øðrum, heldur enn at fólk verða søgd úr starvi, ljóðar tiltalandi uppá meg persónliga, sigur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum*